# Útbúgving gevur úrslit

deildin




## Metingin

**Tilveran sum uppflytari er hørð, og í Andrzej Stretowicz tykist 07 hava mist største profilin. Hinvegin tykist felagið vera væl fyri organisatoriskt, og tað kann geva neyðuga friðin í einum kappingarárið, har órógv uttan fyri linjurnar heilt víst fer at merkja fleiri av kappingarneytunum. Og í Piotr Krakowski hevur liðið ein superoptimistiskan venjara, sum fleiri ferðir hevur fingið optimalt burtur úr sínum tilfeingi.**

**Blaðungur var Ari Thomassen í 1991 við til at vinna altjóða stig í 1-1 javnleikinum móti Norðurírlandi. 18 ár seinni er hann næstformaður í 07 Vestur, har menningin av framtíðar spælarum hevur hægstu raðfesting**

Mynd: Álvur Haraldsen

**Við at leggja størstu orkuna í væl útbúnar venjarar til ungdómin vónar 07 Vestur, at felagið um eini 10 ár kann verða ein verulig-ur faktorur í føroyskum fótbólti. Her og nú er málið tó meira smæðið at halda seg í bestu deildini**

Síðani 1994 hevur fótbólturin í Vágum í trimum umførum roynt at savna oynna í eina eind. Í fyrsta lagi við FS Vágum, sum við skiftandi hepni royndi at bjóða restini av landinum. Eftir at tað skrædnaði millum MB og SÍF í 2003 varð nýggj roynd gjørd við FSV 04, og í fjør varð 07 Vestur sett á stovn sum ein triðja roynd.

Men hvør er so munurin á 07 Vestur og teimum royndum, sum áður eru gjørdar at savna Vágoynna kring eitt felag?

– Upprunaliga FS Vágar var eitt samtak millum tvey ítróttafeløg, meðan 07 Vestur er eitt sjálvstøðugt fótbóltsfelag, og tað er tann stóri munurin. Sum samtak hevði FS Vágar tvey móðurfeløg, sum høvdu ræðisrættin, og tað kundi til tíðir gera tað eitt sindur tungt at sita í nevndini, tí tú mátti støðugt leita aftur til baklandið fyri at vátta tær avgerðir, sum skuldu takast, sigur Ari Thomassen, sum er næstformaður í 07 Vestur.

Tað er eingin loyna, at tá FS Vágar skrædnaði, vóru fleiri klandursmál millum feløgini. Er nýggi bygnaðurin eisini ein roynd at sleppa undan hesum, nú talan bert er um eitt felag?

– Vit hava sjálvandi lært av bæði tí góða og tí minni góða, sum var í FS Vágum. Tað harmar meg serstakliga nógv, at FS Vágar í onkrar mátar fekk eitt ringt orð á seg millum manna, tí tað bar eisini sera nógv gott við sær. Men tað endaði so soleiðis, sum tað endaði, og í dag hava vit so eitt sjálvstøðugt felag, so sama mistak ikki skal endurtaka seg, sigur Ari.

**Menningin í fokus**

Ítróttarliga byrjaði annars sera væl, tá FS Vágar varð sett á stovn. Fyrsta árið gjørdist uppflyting í táverandi 1. deild veruleiki, og felagið vísti fyrsta árið her, at tað kundi bjóða teimum stóru av. Niðurgongdin kom tó eisini skjótt, men tað hevði sínar orsøkir, sigur Ari.

– Har hendi jú nakað í føroyskum fótbólti mitt í 90'unum, tá pengar brádliga av álvara komu í spælið. Í FS Vágum var støðan, at felagið vildi ikki við upp á hendan vognin, og tað merkti, at fleiri berandi spælarar hvurvu. Tað vóru jú framvegis nógvir vágamenn í bestu deildini, men teir spældu ikki í Vágum.

Og hvørji eru so ítróttarligu útlitini, nú eitt nýtt felagslið hevur tikið við?

– Vit høvdu sett okkum sum mál, at vit skuldu flyta upp innan fyri trý ár, men tað eydnaðist so í fyrstu royndini. Ítróttarliga málið hjá 07 Vestur er, at vit hava løntar og útbúnar venjarar hjá øllum liðum okkara. Vit hava ein hugburð um, at vit fyrst brúka pengar upp á venjarar, áðrenn vit brúka teir upp á spælarar, tí vit trúgva uppá, at við góðum venjarum koma eisini góð úrslit.

– Men sjálvandi kenna vit eisini fortreytirnar. Vit eru uppflytarar, so fyri 2009 seta vit okkara ítróttarligu mál eftir tí. Men innan fyri eini 10 ár ætla vit at verða ein av teimum stóru aktørunum í føroyskum fótbólti.

**Úrslitini komu longu**

Og tað er ikki einki, sum Ari hevur hesar vónirnar í. Felagsliðið í Vágum eigur umboð á øllum U-landsliðum, og longu í 2009 verða fyrstu spælararnir úr hesum røðum at síggja í Vodafone-hópinum. Og sum heild verður eitt miðvíst arbeiði gjørt fyri at menna ungdómsfótbóltin.

– Til dømis hava vit koyring av spælarum frá Vestmanna og Kvívík, sum soleiðis koma til okkara at spæla. At vit nú eisini fáa 16-17 ára gamlar við U-landsliðsroyndum í hópin haldi eg vera eitt úrslit av, at vit hava savnað kreftirnar, og at vit á tann hátt hava størri orku til ungdómsarbeiðið.

– Og hava hesir spælararnir eitt kompetent og gott ítróttarlig umhvørvi, so verða teir verandi. Vilja teir meira enn tað, sum 07 Vestur kann bjóða teimum, so fara teir sjálvandi aðrastaðni, men har til er at siga, at fótbólturin her vesturi stendur einki aftan fyri tað, sum tú sært í restini av landinum, sigur Ari Thomassen.


Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo